


## Fenerbacheu eru meistarar

Mótstøðuliðið hjá B36 í europisku meistarakappingini seinasta summar, Fenerbache, vann um vikuskiftið turkiska meistaraheitið. Enn eru tvey umfør eftir at spæla, men tá Besiktas tapti 3-0 móti Bursaspor, va rein 2-2 javnleikur móti Trabzonspor nóg mikið hjá Fenerbache. Verjandi meistararnir úr Galatasary høvdu eisini ein lítlan møguleika at gera seg galdandi, men hendan mistu teir við javnleiki móti Antalyaspor.

## Warnock í øðini

Venjarin hjá Sheffield United, Neil Warnock, er í øðini inn á Liverpool og Manchester United. Tey bæði feløgini hava í nøkrum avgerandi dystum spart fleiri av føstu spælarunum, og hetta kostaði dýrt hjá Sheffield United. Undir øllum umstøðum tapti Liverpool fyrr í mánaðinum 1-0 móti Fulham, og sunnudagin vann West Ham 1-0 útidystinum móti nýkosnu meistarunum. – Eg eri vónbrotin av Manchester United, men um ikki annað, so kendi eg teir spælarar, sum teir sendu á vøllin. Tá Liverpool spældi móti Fulham, vóru tveir spælarar við, sum eg als ikki kendi, sigur Warnock.

# 90 minuttir um 300 milliónir

**Tá ið seinasta leikumfar av ensku Premier League var á skránni í gjár, stríddust feløgini í botninum um nógv meira enn bara stig og heiður. Luttøkan í Premier League er verd so nógvar peng-ar, at bara at yvirliva í deildini er ein stórsigur fyri eitthvørt felag**

PREMIER LEAGUE
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað stóð nógv á hjá hesum monnum í gjár. Vinstru megin venjarin hjá Sheffield United, Neil Wanock, og høgru megin venjarin hjá Wigan, Paul Jewell. Liðini spældu avgerandi dyst, og Wigan vann*

*Mynd: Polfoto*

Sunnudagin endaði enska Premier League, og á seinasta leikdegnum var stórur spenningur í botnstríðnum, har trý feløg stríddust fyri at sleppa undan niðurflyting.

Dysturin á vøllinum var sum vanligt í 90 minuttir, men stríðið um plássini í Premier League er nógv meira enn bert eitt stríð um stig og heiður. Fyri tey feløgini, sum lógu til at fyta niður, var seinasta umfarið eisini spurningur um slakar 300 milliónir krónur.

Pengarnir í Premier League eru øgiligir, og við nýggju sjónvarpsavtaluni, sum kemur í gildi næsta kappingarár, fáa tey aftastu feløgini í Premier League eitt grundgjald á næstan 300 milliónir krónur fyri at taka lut í Premier League. Fyri feløgini, sum eru at finna í hinum endanum av deildini, er grundgjaldið upp í 550 milliónir krónur, og afturat hesum koma allar hinar inntøkurnar.

Jú, Premier League er tað gylta fótbóltslandið, har øll tey 20 feløgini, sum taka lut, á ein hátt eru vinnarar, og tí stóð nógv upp á spæl á vøllinum sunnudagin.

### Sheffield var taparin

Undan seinasta leikumfari var tað greitt, at Watford og Charlton skuldu flyta niður í næstbestu deildini. Spenningur var tí um triðja niðurflytingarplássi, har Wigan, Sheffield United og West Ham øll vóru í vanda. Úrslitini av seinastu dystunum var avgerandi fyri, hvat av liðunum skuldi flyta niður.

Tað gjørdi ikki støðuna minni spenta, at júst Wigan og Sheffield United hittust í seinasta dystinum, og tað var greitt undan hesum dystinum, at tað liðið, sum tapti hendan dystin, mátti flyta niður. West Ham skuldi so royna at gera sítt í trupla útidystinum ímóti Manchester United.

Úrslitini av dystunum í gjár lagaðu seg soleiðis, at Sheffield United gjørdist stóri taparin og flutti niður. Wigan vann nevniliga dystin ímóti Sheffield United, og samstundis vann West Ham ímóti Manchester United.

### Brotsspark tryggjaði sigurin

Øll málini í dystinum millum Wigan og Sheffield United komu í fyrra hálvleiki. Paul Scharner legði Wigan fram um eftir 14 minuttir, men Joanthen Stead javnaði í 38. minutti. Avgerandi málið gjørdi verjuspælarin David Unsworth, tá ið hann beint fyri hálvleikssteðgin skoraði við brotssparki.

Seinasta korterið mátti Wigan spæla við 10 monnum, eftir at Le McCulloch varð útvístur, men Wigan stóð ímóti stóra trýstinum frá Sheffield United.

Í dystinum millum Manchester United og West Ham kom bert eitt mál, og tað gjørdi argentinski spælarin Carlos Tevez. Hann fór fram við fleiri, áðrenn hann skoraði við einum góðum skoti.

Hann setti harvið punktum fyri einum rimmar comeback hjá West Ham, sum fyri bert fáum vikum síðani líktist einum vísum niðurflytara. Men íslendska felagið í Premier League megnaði at koma afturíaftur, og fangaðurin var óførur á Old Trafford, tá ið felagið hevði tryggjað sær plássið í Premier League næsta kappingarár.

## Pengar í Premier League

Premier League í Onglandi er tann fótbóltskappingini í heiminum, har flest pengar eru í umfari. Ein uppgerð hjá Deloitte vísir, at í 2004/05 vóru inntøkurnar í Premier League umleið 15 milliardir krónur - og tað eru 40 prosent meira enn tann næstríkasta deildin, Seria A í Italia.

Útlit eru til enn fleiri inntøkur hjá teimum 20 feløgunum í Premier League næsta kappingarár. Tá kemur nýggja sjónvarpsavtalannevniliga í gildi. Feløgini Sky og Setanta hava gjørt avtalur við Premier League fyri næstu trý árini. Sky skal gjalda 15 milliardir fyri 92 dystir um árið, og Setanta slakar 5 milliardir fyri 46 dystir. Rættindini til útlendskar sjónvarpsrásir fara at geva umleið 7 milliardir krónur, og harafturat koma eisini inntøkur fyri internet og telefonrættindi.